# Tjaldrið



Heystskeiðið 2022/23

# Tjaldrið 2022/23

Blaðstjórar/Editors
Aleksandur Johannesen og Beinta Falkvard Joensen

Blaðfólk/Writers
Aleksandur Johannesen, Anna Solbjerg Jóhansdóttir, Beinta Falkvard Joensen, Haakon P.S. Joensen, Hervør Andreasen, Karin Simonsen, Katrin Norðbúð Joensen, Knud Sigurd Jensen og Lilja Jacobsen

Rættlesarar/Proofreaders
Arnbjørn, Hedvig, Karin og Súsanna

Ummælarar/Reviewers
Knud

Myndprýðarar/Illustrators
Anna, Haakon

Fotografar/Photographers
Anna, Aleksandur, Beinta, Haakon, Hervør, Karin, Katrin, Knud og Lilja

Grafikarar/Graphic designers
Anna, Haakon og Lilja

Perma
Anna Solbjerg Jóhansdóttir

Lærarar
Arnbjørn, Bárður og Súsanna

Prent
Føroyaprent

Føroya Fólkaháskúli 2022/23
www.haskulin.fo





# VÆLKOMIN TIL TJALDRIÐ 2022/23

Vælkomin til Tjaldrið 2022/23.

Hetta blaðið er um alt tað, sum er hent gjøgnum hetta hálva árið, og alt tað, vit hava upplivað. Næmingarnir hava skrivað alt, sum tit fara at lesa (og damn, tað er góður tekstur).

Hetta blaðið er sera gamalt, men tað eru vit ikki. Miðalaldurin hjá flokkinum er 18,1! Øll eru super fresh… burtur sæð frá um morgunin… og um døgurðatíð… og í tímunum… MEN aftan á, tá er energy í (hetta passar ikki tit, vit tvætla bara… fyri tað mesta).

Í hesum blaðnum fara tit millum annað at lesa um okkara túrar, alt frá Kirkjubø til Danmarkar, síggja myndir av ymiskum, og hoyra um slaturin á skúlanum, men eisini um hemmiligheitirnar hjá lærarunum.

Góðan lesihug!

11_LISTA_RAVNAR

# Catchphrases

Lulu Balls

"Karin eg blívi so løgin"

How you pushin Pee

JaaHUU

Mi-mi-mi-mi (Lív sounds)

Tín Frikadella

Babedoole

"Mjólkapoliti" "Slay queen"

"Lilja kom út at roykjaaaa"

"hava vit ikki frí nú?"

"go piss girl" "eg elski ross"

"uggh kunnu vit ikki taka buss?"

*KOYR HURÐINA AFTUR,
AFTAN Á TIT HAVA SKIDE !!!*

"núú... timburmennn??

"Aleksandur hevur tú litað hárið?"

"Kan jeg nasse en smøger"

"vit kunnu skriva um Páll"

"har du en lighter jeg
jeg kan låne"

"kom í Activ"

"skulu vit fara á bókasavnið"

"ballast í vikuskiftinum?"

"only for you my friend"

"kaka???"

"never have I ever!!"

* sex talk *

# Næminga Profilar



Aleksandur Johannesen
17 15/08/05 Leyvan
Ig: @_Johannesen_
Saltangará, Føroyar



Anna Solbjerg Jóhansdóttir
16 23/07/06 Leyvan
Ig: @anna_solbjerg
Saksun, Føroyar



Beinta Falkvard Joensen
17 04/09/05 Jomfrú
Ig: @beinta_falkvard
Miðvágur, Føroyar



Haakon Joensen
21 06/08/01 Leyvan
Disc: @haakonson! #0557
Vágur, Føroyar



Hervør Andreasen
18 04/12/03 Bogamaðurin
Ig: @hervørandreasen5507
Tórshavn, Føroyar



Karin Laksáfoss Simonsen
16 03/10/06 Vektin
Ig: @karindimonsen
Argir, Føroyar



Katrin Norðbúð
17 01/9/05 Jomfrú
Ig: @katrinnorbud
Skála, Føroyar



Knud Sigurd Jensen
18 08/10/04 Leyvan
Sc: @knud_jensens
Frederikssund, Danmark




Lilja Leivsdóttir Jacobsen
18 07/06/04 Tvíburar
Ig: @lilja_Jacobsen
Oyndarfjørður, Føroyar

# Slatur

Tær feskastu leysasøgunar
**úr Føgrulíð!**

skrivað hevur Aleksandur Joensen



Tekning Anna Solbjerg Jóhansdóttir

## HVAT ER UNDIR FRUNTINUM HJÁ ALEKSANDURI?

**Er har eitt Harry Potter arr?**
**Ein tattovering?**
**Eitt opið sár?**
**Eitt svart hol?**
**Er tað har, Sanna krógvar seg?**

**Eingin er heilt sikkur, men eitt er klárt, <u>hann goymir okkurt!</u>**



Føðingardag

Katrin er ofta vekk um vikuskiftið, hví? Hon skal í føðingardag sjálvfylgjandi! Men hvussu ber tað til, at so nógv fólk, hon kennir, fylla? Katrin sigur, hon hevur stóra familju, men… fer hon faktiskt í føðingardag? Tað halda vit ikki! Summi siga, hon fer at sova í onkrum fjósi við rossinum, onnur siga, hon fer í rúsuna! Vit hava hoyrt frá álítandi keldum, at hon er ofta sædd í hjallinum, har hon stjelur kakao...



## BÁRÐUR'SA FEET PICS

Bárður fer altíð avstað mitt í tímum, hvar fer hann? Slaturin sigur, at Bárður selur fótamyndir. Hann fer úr rúminum, so hann kann taka myndinar, tað er eitt hart arbeiði at selja feet pics, men Bárður er ein pro og fær nógvar pengar.

## HOWYOUPUSHYOURPEE: THE REAL STORY




Har er eitt um Beintu, sum fólk ikki vita! Tá hon fer á wc, so ger hon ikki sum onnur, Beinta hevur eitt loyniligt talent, tá hon pissar, so situr hon ikki á kummuni, ***hon sveimar yvir kummuni...***




## MAÐURIN UTTANFYRI HJÁ LÍV!

Hvør var maðurin uttanfyri hjá Lív, við einum handklæði? Ein hemmiligur elskari?
Hvør er hesin maðurin, sum stóð uttanfyri hjá Lív?
Hví hevði hann eitt handklæði? Er tað hesin maðurin beiggi hennara? Er tað hennara loyniligi elskari? Er hann ein-gong til, ella var tað bert eitt spøkilsi?

## KARINSA NATÚRHÁR

Hvør er náturligi liturin á hárinum hjá Karini?
Summi siga brúnt, summi siga, hon er blondina, men sannleikin er tann, at ***<u>Karin faktiskt er skallut og brúkar parúkkar!</u>***

# Túrurin til Kirkjubøar

Skrivað hevur Haakon Joensen

Myndir: Haakon Joensen

Vit gingu nokk so langt. Í byrjanini av túrinum fóru vit fram við nógvum áum. Vit vóru enn tætt við býin, men tað var longu mest náttúra rundan um okkum. Á hesum túrinum høvdu vit tríggjar uppgávur. Tann fyrsta var at heinta tríggjar ymiskar blómur ella annað slag av plantum, og taka eina mynd teimum. Í aðru uppgávuni skuldu okur koyra vatn í eina glaskrukku og takað eitt bílæt ígjøgnum vatnið fyri at síggja, hvussu tað sær út. Tað ringa við hesum var, at vit skuldu taka vatn úr ánni við hondunum. Triðja uppgávan kom seinni á túrinum. Vit fóru frá áunum og komu skjótt niðan í fjøllini. Øll gingu ikki líka skjótt, og vit blivu býtt sundur í nakrar ymiskar bólkar. Ein kundi trúð, at tey aftastu vóru tey seinu, men tað vóru hesi, ið tóku sær best tíð til at observera umhvørvið og síggja alt. Triðja uppgávan var at takað ein stein og stilla hann á onkran hátt, so at tað sær út sum um steinurin er nógv størri og longri vekk, enn hann veruliga er, tá tú tekur eina mynd av tær sjálvum og steininum. Tað allar mesta av túrinum gingu vit í hesum fjøllunum, og at enda komu vit til Kirkjubøar, ein fín lítil bygd.





# Háskúlin í KVF

Skrivað hevur Haakon P.S. Joensen

Lærarin Lív og tveir næmingar skuldu í morgunsendingina í útvarpinum at tosa um, hvat næmingarnir gera á háskúlanum. Næmingarnir, Beinta og Haakon, tosaðu um samstarvið millum FFH og Vallekilde. Lív og næmingarnir fortaldu um projektini, tey hava gjørt saman. Lív fortaldi um verkætlanina "People's future lab", har nógvir skúlar arbeiða saman internationalt um "At varpa meira ljós á burðardygd í undirvísingini". Tá ið Beinta og Haakon vórðu spurd, hvat tey hava gjørt í verkætlanini, fortaldu tey um føroysku listafólkini, sum tey høvdu interviewað, og hvat hesi høvdu lært næmingarnar at gera og annað. Beinta fortaldi eitt sindur um Ole Jakob Nielsen, ið ger lampur úr træi, og Haakon fortaldi um Guðrið Poulsen, ið er keramikari.

Hetta brotið byrjar eftir áleið 01:01:25 í sendingini: https://kvf.fo/gmf?sid=145865



# Túrurin til Nýný

Skrivað hevur Haakon P.S. Joensen

Vit fóru til Nýný at læra at seyma, og endurnýta toy. Nýný er ein seymistova uppi yvir Bláakrossi, har tey seyma ymiskt úr endurnýtslutilfari. Vit lærdu at gera "tote bags". Vit valdu øll eitt stórt stykki toyi, tað kundi vera ein gamal dúkur, teppi ella enntá eitt flagg, og so skuldu vit máta, hvar vit skuldu klippa. Eftir at vit høvdu øll stykkini, skuldu vit folda tey og seyma tey saman. Nøkur blivu liðug við teirra "tote bag", onnur fingu ikki tíð at blíva liðug.



# Túrurin til Koltur

Skrivað hevur Hervør Andreasen

Túrurin til Koltur bleiv avlýstur tvær ferðir, áðrenn vit nakrantíð sluppu á túrin. Fyrst av tí Føroyska veðrinum, og síðani tí okkurt var galið við motorinum í bátinum. Men tann 16. september sluppu vit endiliga avstað. Vit fóru við bussi yvir til Gomlurætt, og so við ribb-báti har frá til Kolturs. Tá vit komu fram, vórðu vit tikin væl ímóti av Bjørn Patursson, ið er hann, sum er einasti, ið eigur hús úti á oynni. Hann vísti okkum runt og fortaldi nógvar søgur um Koltur, og hvussu var har fyrr. Eisini hoyrdu vit søguna um koltursdrongin og hestgentuna. Aftaná ótu vit matpakka og fóru so at ganga ein túr niðan á fjallið. Hetta fjallið er tað minsta fjallið í Føroyum.
Aftan á túrin um fjallið, fóru vit við bátinum inn á háskúlan aftur.
(Fun-fact: minsta fjall í Føroyum er næstan somu hædd sum størsta fjall í Danmark.)





# Túrurin til Kongavarða



Skrivað hevur Hervør Andreasen

Fríggjadagin tann 11. november varð tað endiliga gott veður aftur og einkin mjørki. So vit fóru at ganga ein túr niðan á Kongavarða. Vit fóru við 1´aranum niðan á hamaran.
Síðani gingu vit niðanum skúlan, har vit skuldu klintra upp um eitt hegn, í staðin fyri at ganga tann vanliga vegin, har ein stigi er upp um hegnið. Á veg niðan á fjallið, ganga øll í sínum egna tempo. Summi ganga skjótt, og onnur eitt sindur seinni. Har vóru nógvar smáar pausur á veg niðan. Tað vóru tó ikki øll, sum orkaðu at ganga heilt niðan til varðarnir. Uppi á toppinum var nógvur vindur, men ein fantastisk útsikt.
Síðani gingu vit omanaftur og tóku bussin heimaftur á háskúlan.

# Vitjan úr Danmark

Skrivað hevur Beinta Falkvard Joensen

Vit á Føroya Fólkaháskúla fingu vitjan 3. oktober frá Vallekilde háskúla. Tey vóru her á skúlanum í eina viku. Vit høvdu eina stóra uppgávu, sum vit skuldu arbeiða við, "People's Future Lab", ið er um burðardygd. Hetta er ein global uppgáva, sum 20 aðrir skúlar eisini arbeiða við.
Fyrsta dagin gjørdu vit interview við fólk, sum arbeiða við endurnýslu. Tey vóru Guðrið Poulsen, Ole Jakob Nielsen, Poulina Jóanesardóttir, Tróndur Patursson og Tóra Hansen.
Tá vit høvdu verið úti og interviewað fólkini, skuldu vit hava eina framløgu um, hvat vit fingu at vita frá teimum. Teir næstu dagarnar høvdu vit "work-shops", har vit arbeiddu og gjørdu ting, líka sum tey gera.
Aftaná hesar tríggjar fystu dagarnar, var tað mest bara hygg.
7. oktober skuldu vit á skúlanum heim, meðan tey frá Vallekilde vóru verandi á skúlanum tveir dagar afturat, áðrenn tey skuldu til Klaksvíkar.





# Tróndur Patursson visit

Skrivað hevur Karin Simonsen

Vit vóru tvey úr FFH og tvey úr Vallekilde højskole, sum sluppu at interviewa internationala listafólkið Trónd Patursson.



Vit fýra blivu koyrd av Hedvig (FFH-stjóranum) til Kirkjubøar, har Tróndur býr og hevur eitt av sínum verkstøðum. Verkstaðið og húsið eru í sama bygningi, sum Tróndur sjálvur hevur bygt. Vit sluppu at síggja nøkur av flottu glaslistaverkum hansara, millum onnur sóu vit kendu glasfuglarnar, sum hanga á flogvøllinum og í Norðurlandahúsinum. Teir stóru glasfuglarnir eru inspireraðir av albatrossinum, eisini kendur sum súlukongurin, sum Tróndur sá, tá hann var til skips.

Øll hansara verk eru mest inspireraði av náttúruni, sum hann hevur sæð nógv av og dámar væl. Hann sigur, at teir bestu ummælararnir av hansara list eru eingin onnur enn børn, tí hann vil bara hava fólk at síggja hansara list og blíva glað, og hvør er betri at siga tað enn eitt barn? So tá hann sær eitt barn blíva spent um at síggja hansara verk, tá veit hann, at hann hevur gjørt tað gott.

Hetta var eitt sera skeg og læruríkt upplivilsi.



# Heðin Ziska Davidsen

Skrivað hevur Karin Simonsen

Vit vóru tvey úr FFH og tvey úr Vallekilde højskole, sum sluppu at arbeiða við Heðini Ziska Davidsen. Heðin er ein tónleikari, sum dámar at gera alt møguligt ymiskt við sínum tónleiki, til dømis soundscape, sum er tað, vit gjørdu saman. Tað liggur í orðinum, at man brúkar sítt landscape at gera soundscape beats, ljóð og tónleik.

Vit fingu til uppgávu at brúka okkara telefonir til at upptaka ymiskt, vit kundu hugsa um, sum kundi geva okkurt ljóð frá sær til at gera beats við, og vit upptóku millum annað at greiða hár, vaskið, vind, cola-dós, saks, steinar, fótafet, fólk sum teska, og onnur ljóð. Hetta bleiv sent til telduna hjá Heðini, og so redigeraðu vit øll ljóðini saman, og tað bleiv til nøkur sera kul og hugtakandi beats.

Heðin vísti okkum fleiri mátar at redigera, skoyta uppí og taka frá, sum vit annars ikki vistu, at man kundi gera, hetta var eitt mega hugtakandi og læruríkt upplivilsi. At enda helt hann eina konsert saman við Karoline og Lassa, við brúk av soundscape, ið var mega flott.

# LEIR

## við Guðrið Poulsen



Tekning: Haakon P.S. Joensen

Skrivað hevur Haakon P. S. Joensen

Vit fóru til verksmiðjuna hjá Guðrið Poulsen fyri at gera samrøðu við hana um keramikk, hvussu hon arbeiðir, og um burðardygd.
Leir er ikki náttúrliga til í Føroyum, so keramikkur kann ikki gerast 100% burðardyggur, men tað er kortini meira burðardygt at keypa koppar og tílíkt hjá Gurðið, í staðin fyri at bíleggja tað uttanlands frá á netinum.
Seinni kom Gurðið út á Háskúlan og lærdi nøkur av okkum at arbeiða við leiri. Man skal taka eitt sindur av leiri og blanda tað við vatni fyri at gera tað bleytari. Um tað verður ov bleytt, kann man blanda meira leir uppí. Fyrst og fremst lærdu vit at gera lítlar koppar, har man skuldi forma leirið og við vatni royna at fáa øll "knekk" í leirinum vekk, so tað gjørdist slætt. Tá man hevur fingið skapið, man vil hava, kann man markera okkurt á koppin, um man vil, og so skal man mála koppin við tí, sum verður rópt "glasuri" (ikki tað sama sum á køkum). Glasururin kann innihalda ymiskt, so sum basalt, molað niður til pulvur (her er møguleiki fyri at nýta føroyskt tilfar), og glasururin kann geva ymiskan tekstur til koppin (ella hvat man velur at gera burtur úr leiri). Síðan skal tað, sum man hevur gørt úr leiri, "brennast", t.v.s. koyrast í ovnin. Vit gjørdu ymiskt burtur úr leiri.





## SMÚKKUR VIÐ TÓRU HANSEN




Tekning: Anna Solbjerg Jóhansdóttir

Skrivað hevður Beinta Falkvard Joensen

4. oktobur vóru Anna, Hervør, Katrin, Søren og tvær aðrar gentur úr Danmark í Sandavági og gjørdu eitt interview við Tóru Hansen. Tá vit komu til Sandavágs við bussinum, kom Tóra og tók ímóti okkum, og tá vit komu heim til hana, bjóðaði hon okkum ein drekkamunn, beint áðrenn vit fóru undir interviewið.

Tóra ger smúkkur í fríðtíðini. Tá hon ikki ger smúkkur, arbeiðir hon á einum flakavirki. Smúkkurnar eru gjørdar burtur úr granitti. Interviewið gekk væl, vit høvdu ein tima eftir, áðrenn vit skuldu heim, so vit fóru ein túr til Trøllkonufingur.



# Lassi og Karoline

Skrivað hevur Hervør Andreasen

Lassi og Karoline eru tveir tónleikarar, ið gera nógvan norðurlendskan tónleik. Lassi er úr Finnlandi og spælir fyri tað mesta violin, eisini spælir hann tað tjóðskarparliga instrumentið hjá Finnlandi, ið er ein tagelharpa (Jouhikko). Og sum allir aðrir tónleikarar, sang hann eisini eitt sindur. Karoline er úr Danmark, høvuðsinstrumentið hjá henni er hennara rødd, men eisini spælir hon klaver og eitt slag av trummu, ið eitur shamantrumma.

Lassi og Karoline skuldu undirvísa okkum í nakrar dagar. Vit gjørdu nógv ymisk øvilsir við røddini og kroppinum. Eisini sum við Joël og Miriam gjørdu vit nógv við rytmu, sum oftast byrjaði Karoline við eini rytmu, sum vit so skuldu gera aftaná.

Saman við Lassa og Karoline sungu vit eisini nakrar sangir. Eina finska vøgguvísu, ið eitur "Nuku nuku", eina norska vøgguvísu, ið eitur "Sylla rylla", og eisini eina føroyska vøgguvísu. Eisini lærdu vit fleiri mátar, sum man kundi klappa uppá, og við hesum mátunum og fleiri fólkum, kundu vit samanseta tað og fáa tað at ljóða sum at tað regnaði. Hesar fáu dagarnar saman við okkum, var eisini føroyski tónleikarin Heðin, og við honum lærdu vit næmingar og Lassi og Karoline at dansa føroyskan dans og at kvøða. Ein av teimum seinastu døgunum við Lassa og Karoline lærdu vit tað, sum eitur joik. Joik er eitt slag av sangi, ið minnir eitt sindur um at jodla. Fyri at joika, skal man hava serligt loyvi frá einum lappa, sum er tað, ein úr Lapplandi verður róptur. Karoline er tó ikki úr Lapplandi, men hevði fingið loyvi frá einum lappa til at læra onnur joik og at fortelja søguna um tey.

Tann síðsta dagin, tey undirvísti okkum, var ein maður komin, sum skuldi filma okkum og tað, vit gjørdu, til eina sending um norðurlenskan fólkamusikk. Vit endaðu dagin við at hava konsert fyri lærarunum, har vit sungu tað, vit høvdu lært hesar fáu dagarnar. Seinni á kvøldinum høvdu Lassi og Karoline eisini eina konsert, har øll vóru vælkomin at lurta. Tá konsertin hjá teimum var liðug, vildu fólk hoyra meira, so vit næmingar endaðu við eisini at framføra tað, vit høvdu lært saman við Lassa og Karoline, fyri fleiri fólkum.

Her er link til sendingina, sum bleiv gjørd:
https://www.facebook.com/nordiskkulturkontakt/videos/1457038164783721



Myndprýtt hevur Anna Solbjerg Jóhansdóttir

# Joël og Miriam

Skrivað hevur Hervør Andreasen

**Joël og Miriam eru eitt par, sum hevur verið ein partur av einum sirkusi í nógv ár. Tey vóru og vitjaðu okkum á skúlanum í umleið 2 vikur. Fyrstu vikuna skuldu tey bara búgva á skúlanum, meðan tey høvdu framførslur runt í Føroyum, og tá sóu vit ikki nógv til tey. Vikuna eftir høvdu vit tað, sum bleiv kallað sirkusvika, har Joël og Miriam skuldu undirvísa okkum alla vikuna.**

**Joël er 54 ár og kemur úr Fraklandi. Sum ungur gekk hann nógv á línu; bæði teimum, sum vóru einar 3 metrar uppfrá, har hann gjørdi ymsan akrobatikk, og á línu, sum var fleiri 100 metrar uppfrá, t.d. millum tveir høgar bygningar. Nú tá hann er tað eldri, ger hann fyri tað mesta klóvnarí og gyklarí (juggler).**

**Miriam er 45 ár og kemur úr Amerika. Sum ung gjørdi hon mest akrobatikk. Eftir sum at hon eisini var so lítil og løtt, var hon altíð tann, sum skuldi verða lyft ella kastað upp í luftina. Nú sum eldri, ger hon enn eitt sindur av akrobatikki, men eisini klóvnarí sum Joël. Saman við Joël og Miriam lærdu vit nógv um at fara yvir mørk, ið ein vanliga ikki hevði farið yvir. Vit gjørdu nógv øvilsir, har vit skuldu spegla hvønn annan, fylgja rytmu og gera ymisk onnur øvilsir til eina rytmu, fylgja hondini hjá einum persóni við høvdinum, flyta ymisk ting, m.a. bóltar og pinnar, eftir eini beinari linju. Eisini lærdu tey, ið vóru áhugaði, at juggla við bóltum.**

**Sum tað síðsta í vikuni, gjørdu vit eina framsýning fyri lærarunum, har vit vístu alt, vit høvdu lært gjøgnum vikuna. Eisini gjørdu vit tvey og tvey eina lítla framsýning, har vit høvdu fingið ein lut og skuldu finna uppá okkurt at gera burtur úr honum. Summi fingu kustar, jogabóltar, nøkur onnur fingu jogamáttur, og fingu nakað so simpult sum tvær spannir. Men allar framsýningarnar vóru ómetaligani góðar og ikki minst eisini nakað so stuttligar.**



Myndprýtt hevur Anna Solbjerg Jóhansdóttir

# Vit vitja Danmark

Skrivað hevur Beinta Falkvard Joensen

20. november fóru vit niður til Danmarkar. Upp kl. 05:00, við bussinum til flogvøllin kl 06:20, og so í flogfarið kl 08:20.
Vit lendu kl 11:30 sirka, og vóru í Keypmannahavn í fýra tímar og bíðaðu eftir toki og bussi.
Tá vit komu til Vallekilde, var klokkan umleið 16:30. Vit gjørdu einki serligt tann dagin, og endaðu kvøldið skjótt.
21. november vóru vit og ein annar flokkur og vitjaðu eina konu, sum ger ymisk kunstverk. Tað var kavi tann dagin, so vit fóru ein skógartúr við einari guide. Túrurin var langur, og dagurin endaði tíðliga, so vit gjørdu tað, sum vit vildu (sum var at ganga ein hálvan tíma bara fyri at keypa okkum okkurt).
22. november skuldu vit gera gamalt pappír til nýtt pappír, og aftaná tað fingu vit eina ordiliga rundvísing á Vallekilde skúlanum. Um kvøldð vórðu vit biðin um at koma í køkin at gera súrepladjús (smakkaði væl).
23. november gjørdu vit skálir, borðskánarar og smáar plátur burtur úr jesmonite, sum er eitt slag av sement. Vit kundu eisini gera okkara egna kamera, og seinni tann dagin fóru vit til eitt "escape room", sum skuldi taka 45 minuttir at koma út, men onkur fólk arbeiddu ikki so væl saman, so tað, sum vit lærdu av hesum var, at vit skulu arbeiða meira saman. Tá vit vóru liðug við hetta, fóru nøkur til eina matstovu, og hini fóru heim.
24. november fóru vit í 3 ymiskar bólkar at arbeiða um burðardygd, nøkur arbeiddu við glasi, onnur við toyi, og onkur við súreplum. Og so gingu vit ein túr, áðrenn vit skuldu úr skúlanum dagin eftir.
25. november skuldu vit heim. Vit høvdu 3 tímar, til vit skuldu úr skúlanum, so nøkur fóru at hyggja at filmi (Skál), og nøkur fóru at gera smákøkur. Tá vit fóru avstað, koyrdu vit í 2 tímar, og tá vit komu til Keypmannahavnar, fóru vit til eitt hostell.
26. november fóru vit tíðliga upp at shoppa, og so beint til flogvøllin. Dagurin var langur, men hann gekk skjótt. Upp kl. 08:00, heima kl 21:00.



# Tónleikur

Skrivað hevur Anna Solbjerg Jóhansdóttir

Vit hava gjørt eitt sindur við tónleik hendan árgangin, og vit vilja fegin deila tað, vit hava sungið, við tykkum :)




Árið byrjaði við:

Veturin kom við kulda og kava  (síða 221 í *Okkara sangbók*, 2018)
"Veturin kom við kulda og kava,
 ringt er hjá seyðinum, hart er at skava…"

Nykurs vísa (hon er á Snar.fo heimasíðuni)

"Nykurin letur sær klæði skera
Harra mín
Tí hann vildi ein riddari vera
Um summarið har allir fuglar syngja væl"

Tango kettan (síða 199 í *Syng-bókini*)

"Mín ketta dansar tango, tango tango"

Nuku nuku Nurmilintu (ein finsk vøgguvísa)

"Nuku, nuku nurmilintu
Vasy, vasy,  vastarakki
Nuku nurmelle hyvalle,
Vaivu male valkialli"

Sylla rylla (norsk vøgguvísa)

"Sylla rylla, Sylla rylla, Sylla rylla lea"

Og ein av okkara yndis at syngja við:

"Grakaris græs høvd"
og
"Pedofilurin"






Myndprýtt hevur Anna Solbjerg Jóhansdóttir

# Dad Jokes



Onkur segði, míni klæðir vóru gay... asso tey eru akkurát komin úr skápinum.

What do you call somebody with no body and no nose? … Nobody knows.

Eg spurdi hund mín, hvat 2 minus 2 var, hann segði **einki.**

I used to be addicted to soap, but I'm clean now.

How do you follow Will Smith in the snow? … You follow the fresh prints.

What do astronauts do before throwing a party? … They planet.



Why did the Scarecrow win an award? **… Because he was outstanding in his field.**

Hvussu lumpar man eitt kips? … Tú dippar tað í kettjup og etur hin endan.

What do you call a poor Santa Claus? … Saint nickel-less.

Myndprýtt hevur Anna Solbjerg Jóhansdóttir

# Quotes frá kømrunum

Í næstan øllum kømrunum hevur onkur frá árgangunum áðrenn teg skrivað okkurt onkustaðni. Vit hava savnað nøkur av "quotunum" til næsta árgang at finna, og so hava vit eisni skrivað nýtt, har vit plagdu at búgva, og eisni uppiá...

"A heart is not to play with It's not a toy but if you want it broken just give it to a boy"

"Dio Brando"

"Les"

"Hvít í stendur skrivað her Astrid Dalsgård"

"Love skúlarík 15 ár"

"You > Hanus"

"Summartíð 1967"

"Astrid + Hanus"

"Borgahjø + Jørgvin"

"Borgahjø Petersen"

"Jandi 15ár summarið 1967"

"Takk fyri hesu ferð!"

"Hanna Jóanisdóttir FFH 18"

"Ýr&Sylvia&Joan&Johnfinn árg 2019"

"Maria Andresen! Meghan Maseman 2014"

"Instagram-Sylvia123123"

"Sylvia Davidsen árgang 2019"

"1 Life 0 Regrets 5 Lovers 1 Death"

"1 True Love 3 Kids 1 Parent 100 Dissapointments 1 God"

"Live your life…"

"Good people don't need laws to tell the to act responsibly and bad people will find a way around the laws -Platon"

"Let the object of objection become but a dream as I cause the seen to be unseen"

"Noob :)"

"Rúni"

"Rutt Reinert 2001"

"Her hava ann-britt heidi og hildibjørt verið"

"Jóanes johannesen"

"Sand"

"You sly dog"

"Hanna"

"Yolo#"

"#haskulin"



Myndprýtt hevur Anna Solbjerg Jóhansdóttir

# Bindikonan & MUSKULMAÐURIN

Dulnevnd/-ur

Tað var ein kaldur dagur í heyst, og bindikonan var farin í gongd við at binda heitar ullintar troyggjur, tí hon visti, at nógv skjótt fóru at koma at keypa, tí nú byrjaði tað at blíva serliga kalt um alla oynna.
Eftir at hava fingið sær ein smakk av súrum sitróntei, ið allíkavæl smakkaði søtt av sukrinum, suffaði bindikonan og segði: "Nei, her eru bara so keðiligar farvur, sum í einum filmi frá 1937! Eg má fáa mær onkran lit."
Hon fór eftir stiganum, so hon kundi taka eskjuna á topphillini. Men so tá hon setti stigan móti hillini, knekkaði hann, áðrenn hon fekk farið so mikið sum eitt trin upp. Hon suffaði aftur, men so hoyrdi hon brádliga eitt brak uttanfyri, og so hoyrdi hon tað umaftur, men harðari. So datt ein risastórur steinur á vegin frammanfyri handilin hjá bindikonuni.
Hon fór út at hyggja nærri at, og so kom ein stórur, sterkur maður, við berum yvirkroppi og myrkabrúnum hári, ið stóð beint uppeftir, og lyfti 4m3 av basalti upp um høvdið.
Fólk, ið stóðu á gøtuni, runnu skríggjandi vekk frá muskulmanninum, men ikki bindikonan.
"Halló tú, hvat gert tú?" spurdi hon.
Muskulmaðurin setir steinin frá sær. "Eg eri um at blíva svakur av hesum kuldanum, og eg royni at halda meg heitan," svarar hann.
"Jamen, hví ert tú so illa ílatin?" spyr hon.
"Ongar troyggjur passa til mín, tær skrædna, um eg lati meg í tær," svarar hann.
Uttan at siga eitt orð, fór bindikonan yvir til hansara við einum mátibandi, koyrdi tað rundan um hørðu, sveittutu yvirarmarnar og breiða yvirkroppin, og fór so inn í handilin hjá sær. Sum eitt snarljós fekk hon bundið eina svarta og hvíta troyggju til muskulmannin, ið enntá var eina stødd størri enn neyðugt.
Eftir at hann hevði flutt steinin av vegnum fyri bilunum, bjóðaði bindikonan honum inn.
Muskulmaðurin takkaði bindikonuni og vildi gjarna hjápa til í handlinum.
"Fært tú tikið hasa eskjuna av ovastu hill?" spurdi hon.
Hann nikkaði glaður, men sjálvt ikki hann rakk upp til eskjuna.
Bindikonan hugdi niður og suffaði, men so tók muskulmaðurin um hana og lyfti hana upp.
Hon rodnaði eitt sindur, men tók eskjuna. Tá hon bleiv sett niður, klemmaði hon hann.
Í eskjuni var reytt tógv.

*Stuttsøgan er inspirerað av, tá Arnbjørn las "bindihorn" og "musikkmaður" sum "bindikona" og "muskulmaður"*



Myndprýtt hevur Haakon Joensen

Skrivað hevur Hervør Andreasen

# SANNA

– ein ræðusøga

Í 1909 flutti Føroya Fólkaháskúli, ið Rasmus Rasmusen og Símun av Skarði høvdu stovnað, niðan í Hornabø 14 í Havn. Símun og kona hansara Sanna búðu á skúlanum saman við næmingunum. So ein dagin í desemburmánaði var Símun farin út at taka ímóti einum báti, ið kom við jólatrøum til Føroyar. Meðan Símun var úti, var Sanna eftir á skúlanum við næmingunum, sum pakkaðu síni ting til at fara heim í jólaferiu. Sanna var farin inn á kamarið hjá sær og Símuni, ið var kamar nummar 8, og hevði lagt seg at lesa eina bók.

Meðan Sanna lá á kamarinum og las sína bók, savnaðust næmingarnir, uttan at vita hví á bókasavninum, og brádliga høvdu allir eina stóra trongd til at gera av við Sannu.

Tveir næmingar brutu inn á kontórið eftir einum lykli til kamar nummar 8, meðan hinir næmingarnir fóru inn á verkstaðið eftir einari sag, hamara, bandi og naglum. Næmingarnir savnaðust allir aftur uttan fyri kamar nummar 8. Næmingurin við lyklinum læt upp inn á kamarið og fór inn. Sanna var sovnað. Tey bundu hana fasta til songina. So tóku tey ein nagla og hamaran fram og byrjaðu at smíða naglan í knæið hjá Sannu fyri at fáa hana at vakna. Tá hon vaknaði, tóku tey næsta naglan fram og settu hann í hitt knæið. Sanna ýldi av pínu.

Hon biddaði og bønaði um náði, men har var eingin máti at fáa samband við næmingarnar.



Eyguni høvdu stórar pupillur og vóru kolasvørt.
Tá næsti naglin var komin í, tók ein næmingur sagina fram og byrjaði at saga føturnar av Sannu. Sanna var í so nógvari pínu, at hon small um og svímaði. Tá Sanna var so mikið langt burtur, hamraðu tey ein síðsta nagla mitt í høvdið á henni. Næmingarnir lótu hana liggja á kamarinum til at doyggja, og stongdu hurðina eftir sær. Tey ruddaðu og vaskaðu alt, tey høvdu brúkt, og møttust síðan aftur á bókasavninum. Næmingarnir vaknaðu við aftur og skiltu einki um, hví teir stóðu inni á bókasavninum. Tey hugsaðu ikki meira um tað, og fóru inn á kømrini aftur at pakka víðari.
Til tann dag í dag spøkir Sanna á skúlanum. Har fer mangt fram inni á kamari nummar 8. Gólv, sum brakar, tá eingin er har. Ljós, sum verður tendrað og sløkt av sær sjálvum. Hurðar, sum fara upp og aftur. Útvarpið, sum tendrar. Og so hava fleiri næmingar, ið gingu á skúlanum árini eftir, upplivað tað, at onkur tekur í føtur teirra um náttina, tá tey sova ...

(Í veruleikanum doyði Sanna í 1978 og bleiv heili 102 ára gomul).

# Fun Facts um lærararnar

Skrivað hevur Karin Laksáfoss Simonsen

## Hedvig Westerlund-Kapnas

Hedvig er okkara skúlastjóri úr Finnlandi, hon er sera positiv, dámar nokk so klassisk ting, dempaðar litir, laks og oliven, túrar í náttúrini o.s.v., men hon hevur eina hemmiligheit… tá hon kemur heim og er innanfyri læstar hurðar, lurtar hon eftur… ger tykkum klár… HEAVY METAL tónleiki, hetta hevði eingin væntað.. er tað kanska sodan, hon fær vreiði sína á næmingarnir út ???

## Bárður DC

Bárður hevur eina long kept hemmiligheit… man sær hann úti og heldur, at hann bara er ein vanligur fýrur… men undir maskuni.. undir sokkunum.. hevur hann yvirdrivnar langar bibbur og lítla stórutá… trýrt tú mær ikki??... her er ein mynd..!! Watch with caution !



## Arnbjørn Ólavsson Dalsgarð

Arnbjørn er ein sera føroyskur skrivilærari, man hyggur at honum og sær ein vaksnan mann við brúnum skeggi og hárið, í strípután bláari skjúrtu og cowboy-buksum. Hann hevur skrivað føroysk yrkinga- og stuttsøgusøvn. A.K.A. ein ordans føroyingur… aftan fyri hesa maskuna hevur hann eina hemmiligheit, sum man ikki hevði væntað… í frítíðini lurtar hann eftir…get ready.. GIRLY POP MUSIC ! Hetta kom sum eitt sjokk fyri okkum øll.. her er ein av hansara got to P!nk: I don't believe you

## Marjun Svartafoss

Marjun virkar sum ein sovorðin hálvstrangur lærari, sum altíð hevur okkurt at gera. Hon syngur Hart við til kvæði, og førir í tí føroyska dansinum. Men tó er tað ikki bara tað, sum hon ger í frítíðini… Hon hevur eina festliga hemmiligheit… aftan fyri alt hetta føroyska og seriøsa, aftan fyri gardinurnar, stendur eitt støvut, óvæntað DISKO-STEYP!! Nær hevur Marjun dansa? Hvar hevur hon dansað?? Tað eru teir brennandi spurningarnir… Meira vita vit ikki, men vit kunnu gita okkum fram… kanska var Sanna hennara dansipartnari??

# Hunt for the Wilderpeople

Filmanmeldelse

Skrevet af  Knud Sigurd Jensen

Ricky Baker er et trodsigt ungt bybarn, som bliver sendt af  børneværnet ud for at bo på landet hos plejeforældre, som han kalder tante Bella og onkel Hec.

Da Bella dør, og børnetjenesten beslutter at tage Ricky tilbage til et børnehjem, løber Ricky ud i bushen med onkel Hec på jagt.

Børnetjenesten ankommer og finder huset tomt, og kommer til den konklusion, at en efterladt og mentalt ustabil Hec har bortført Ricky. En national menneskejagt følger, og de to er nødt til at komme over deres uoverensstemmelser for at overleve.

Når vi første gang møder Hec, ville du kunne tro, at dette var endnu en af de film, hvor en gnaven gammel mand ikke vil kendes ved barnet han møder, men gradvist begynder at kunne lide ham, og de opbygger et bånd hvilket vil gøre dem til metaforiske far og søn til enden.
Filmen følger samme fortællings bue, men den styrer uden om alle de sygt søde clicheer. For eksempel den obligatoriske tale, som en af  dem plejer at have til sidst om livstimer og hvordan de eventyr de har haft sammen, har åbnet deres øjne for det gode i livet.
Dette er simpelthen en vidunderlig fortælling om to fortabte sjæle, der farer vild og til sidst finder de mest bizarre og sjove mennesker, som til gengæld lærer dem, at alt ikke er tabt, vi er alle forskellige, og vi lærer at klare det.
Dennison er en åbenbaring i rollen som Ricky, der, uanset hvad han har gjort i fortiden, bare er en, som menneskeheden har glemt og vendt ryggen til.
I modsætning til andre lignende film, er Ricky en behagelig karakter hele vejen igennem filmen, og drillerierne mellem ham og Hec er smukt finurlige, især når de taler om karrieren som "gangster".

Der er nogle virkelig iøjnefaldende scener, og hvis der er en sjovere begravelsesscene i en film, har jeg endnu ikke set den. Stederne, naturen og måden den er filmet, tilføjer kun til filmens charme.
Det er en skam, at sjælløse film med store budgetter, tager alle biografseerne, fordi de går glip af  en skøn film som denne.
For mig er Taika Waititi den perfekte filminstruktør. Han kan på magisk vis skabe et mesterværk ud af  en clichedrevet historie.

*Instruktør (Taika Waititi)*
*Ricky Baker (Julian Dennison)*
*Hector (Sam Neill)*
*Bella (Rima Te Wiata)*
*Paula (Rachel House)*

★★★★★

# Matuppskriftir Skúlans

Skrivað hevur Haakon Joensen



Bananbreyðið hjá Oddvør:
- 3 búnar bananir
- ⅓ kopp av smøri (75 g), smeltaðum
- ½ kopp av sukuri (100 g)
- 1 egg
- 1 teskeið av vanilljuekstrakti
- 1 teskeið av bakipulvuri
- ½ teskeið av salti
- 1½ kopp av mjøli
- ½ kopp av minisjokuluátuprikkum

Mannagongd:
Upphita ovnin til 180 stig selsius
Koyr bananirnar í ein bolla og mosa tær, til tær eru glattar (teksturin á bananmosi). Stoyt smeltaða smørið í og rør, til tað er væl blandað saman.
Koyr sukur, egg, vanilju, bakipulvur, salt og mjøl í og rør, til deiggið er glatt (teksturin).
Koyr sjokulátuprikkarnar í og oys deiggið í ein smurdan form. Koyr eyka sjokulátu útyvir.
Set í ovnin og baka í 50 minuttir til ein tíma. Man kann brúka tannstikkara-metoduna (stikk ein tannstikkara niður í mittuna á kakuni, og um tað er vátt deiggj á, tá tú tekur hann úr, set so inn aftur í ovnin eina løtu).
Lat bananbreyðið kølna heilt, áðrenn nakar fær sær av tí.
Vælbekommen!

Smoothies:
Peace-smoothie
- Multi-djús
- Rísmjólk
- Kiwi
- Agurk
- Mango
- Papaya
- Ananas
- Appilsinskal (orange zest)
- Lime-saft

Kann nýtast: - Ingifer

Mannagongd:
Ananas, papaya og mango skulu skerast í smáar bitar og frystast. Man koyrir rísmjólk og eitt sindur multi-djús í blendaran, tað eru veskurnar, og so byrjar man at koyra tað fasta í. Agurku rívir man eitt sindur í, kiwi sker man í stykkir og koyrir fleiri í (kiwi er tað, man brúkar mest av, um man ikki telur rísmjólkina og multi-djúsið við). Man rívur eitt sindur av skalinum á einari appilsin í blendaran, ella orange zest sum man kallar tað á enskum. Til síðst koyrir man tær frystu fruktirnar í, koyrir lokið á og blendar. Eftir at hava koyrt í eitt glas, kann man ríva eitt sindur ingifer útyvir sum garnish.

Love-smoothie
- Bananir
- Jarðber
- Ananas
- Rísmjólk
- Multi-djús

Mannagongd:
Ananas skal skerast í smáar bitar og frystast. Koyr rísmjólk og multidjús í blendaran. Sker jarðber og bananir í lítil stykkir og koyr í. Koyr frystu ananasbitarnar í og blenda.

Haakon's smoothiebumba
- Ingifer

Sker ingiferið í lítil stykkir, koyr í blendaran og blenda. Eftir at hava koyrt tað í eitt glas, kann man riva eitt sindur av ingerfer útyvir sum garnish. (Hendan smoothie'in verður ikki viðmæld at prøva!)




Skrivað hevur Aleksandur Johannesen

Eg havi sett meg við Marjun Svartafoss fyri at fáa svar upp á heimsins mest týdningarmiklu spurningar.

Aleksandur: Ókay, so hetta verða bara nakrir skegir “would you rather”-spurningar.
Marjun: Ókay, tað visti eg ikki av, ja.
A: Ja, vit byrja bara. Um tú hevði kunnað valt, hevði tú viljað havt ein eyka fingur, ella eina eyka tá?
M: Ei, eina eyka tá, heilt sikkurt, tí at eg eri av kópaætt, úr Mikladali, sum tit vita, so faktiskt havi eg fitjur millum tærnar, so tí hevði eg viljað havt eina ordiliga tá.

A: Hevði tú heldur viljað verið ein superhetja, ella ein gandakallur?
M: Eg hevði viljað verið… ein gandakallur! Ja, tí so hevði eg gandað meg til eina superhetju!
A: (flennir)
M: Og tað kann superhetjan ikki, um hann ikki dugir at ganda. Eg hevði valt gandakall, heilt sikkurt… Harafturat elski eg spískar hattar, eg haldi, eg hevði riggað betur sum gandakallur, eisini við míni nøs, ja, og eg hevði havt ein sovorðnan (viftar við aðrari hondini) stav, ja tað haldi eg. Eg dugi ikki ordiliga at síggja meg sjálva flúgva gjøgnum luftina í kappa (flennir).
A: Eg hevði væl tímað at sæð tað.

A: Hevði tú heldur viljað havt ongar albogar, enn eingin knø?
M: ... Hatta var ein forbiðið ringur spurningur. Um man ongar albogar hevur, fær man ikki boygt armin.
A: Men um tú eingin knø hevur…
M: So kann eg ikki dansa … men um eg ongar albogar havi, so fái eg ikki etið.

A:.. Man kann læra at brúka bibburnar?
M: Ja… Tað kann man sjálvandi… (heldur fótin fram til andlitið) jú!
A: Hygg! Tú røkkur ordiliga væl.
M: Eg havi - jú, jú, nú havi eg prøvað tað, eg hevði klárað meg uttan albogar, men ikki uttan knø… eisini tí mær dámar so væl at dansa.

A: Hevði tú heldur viljað verið eitt træ, sum følir pínu, enn ein snigil, sum aldrin doyr?
M: Hmmm… eg hevði heldur vilja verið eitt træ, sum følir pínu, ja.
A: Ja?
M: Ja, tí at vissi man følir pínu, so følir man eisini gleði og sovorðitt, so fær man notið tilveruna, og ein partur av at njóta hana er at vita, at hon ikki er óendalig. Um tú ert ein snigil, sum livir allar ævir… eg haldi simpulthen, at tað er ov køvisligt, nei, nei, so vil eg heldur hava pínuna við.
A: Flott svar, hatta bleiv ordiliga djúpt.

## Krabbarnir

Myndprýtt hevur Anna Solbjerg Jóhansdóttir



# spøl

## Finn fimm feilir




| | | | | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| | | | 2 | 6 | | 7 | | 1 |
| 6 | 8 | | | 7 | | | 9 | |
| 1 | 9 | | | | 4 | 5 | | |
| 8 | 2 | | 1 | | | | 4 | |
| | | 4 | 6 | | 2 | 9 | | |
| | 5 | | | | 3 | | 2 | 8 |
| | | 9 | 3 | | | | 7 | 4 |
| | 4 | | | 5 | | | 3 | 6 |
| 7 | | 3 | | 1 | 8 | | | |

Hvønn spurning kanst tú aldrin svara ja til?

| | | | | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | 5 | | 2 | | 9 | | | 4 |
| | 4 | | | | 6 | | | |
| | | | | 4 | | | 6 | 3 |
| | 7 | | | | | 8 | | 6 |
| 6 | | | | | | | | 5 |
| 2 | | 8 | | | | | 1 | |
| 4 | 6 | | | 8 | | | | |
| | | | 6 | | | | 7 | |
| 8 | | | 5 | | 1 | | 4 | 9 |

Eg havi vegir, men onki asfalt. Eg havi áir, men ongar fiskar. Eg havi skógir, men ongi trø. Eg kann fylla alla verðina, men onki menniskja. Hvat eri eg?

| | | | | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| | | | | | | | | |
| | | | | | 3 | | 8 | 5 |
| | | 1 | | 2 | | | | |
| | | | 5 | | 7 | | | |
| | | 4 | | | | 1 | | |
| | 9 | | | | | | | |
| 5 | | | | | | | 7 | 3 |
| | | 2 | | 1 | | | | |
| | | | | 4 | | | | 9 |

Tú kanst hoyra meg og stýra mær.
Tú kanst gera meg størri og minni, men tú hvørki sær meg ella kanst nema við meg.
Hvat eri eg?

| | | | | | | | | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| R | D | K | H | E | D | V | I | G | L | Đ | K | F |
| A | H | G | E | S | B | P | J | L | A | N | Ø | O |
| S | R | Æ | N | T | Æ | Y | S | A | Ø | V | J | M |
| M | K | L | T | F | T | A | H | S | S | A | L | B |
| U | K | I | E | J | H | G | G | H | T | L | E | V |
| S | L | B | E | I | K | K | R | U | Ó | L | V | P |
| R | A | V | N | U | R | S | J | J | N | E | B | Đ |
| A | Đ | F | Ø | U | D | B | Ø | D | L | K | F | R |
| S | S | Đ | D | Æ | Đ | L | Đ | Æ | E | I | J | Æ |
| M | O | R | G | U | N | M | A | T | I | L | S | J |
| U | O | J | V | F | L | P | D | S | K | D | Æ | G |
| S | I | N | Ó | L | E | T | R | Æ | U | E | Y | S |
| E | A | Æ | T | S | I | R | B | Y | R | M | I | O |
| N | G | D | Æ | G | K | E | L | G | E | Y | K | L |
| L | D | H | L | E | A | T | B | U | S | S | U | R |

1. L_ _ _ _
2. R_ _ _ _ _
3. R_ _ _ _ _R_ _ _ _ _ _ _ _
4. B_ _ _ _ _
5. V_ _ _ _ K_ _ _ _
6. H_ _ _ _ _
7. T_ _ _ _ _ _ _ _
8. G_ _ _
9. L_ _ _
10. M_ _ _ _ _ m_ _

Hjálp Hedvig at koma yvir á Háskúlan



# Oddvør Appreciation

Skrivað hevur Karin Simonsen

Vit komu øll stúrin á Háskúlan, bangin um, at vit fóru at sakna matin heimanífrá, men oh boy we were wrong. Vit hava fingið luksus lekkran morgunmat, døgurða og nátturða. Morgunmatarborðið hevur egg, ber, frukt, jogurt, mysli, ymisk djús, man kann gera sær sandwich, man kann gera sær tóst. Eisini er bomb ass ommukrem, og millum annað gott pálegg, lekkurt te og kaffi, góðar avokado, og onkrar morgn ar fáa vit enn tá pannukøkur.

Til døgurða fáa vit alt frá grind og spik til pitsur og pitabreyð. Vit hava møguleikan at gera okkum tóst, sandwich og rugbreyð, um man vil tað, til ALLAR máltíðirnar. Vit kunnu øll koma við uppskotum til allar máltíðirnar, men ansa eftir, tí tú sigur, tí um Oddvør hoyrir tað, keypir hon straks inn, og so stendur tað á borðinum í nærmastu framtíð.

Nátturðin er altíð okkurt lekkurt, og sum oftast cozy matur, ofta aftur við oddvørsa FANTASTISKA bananbreyði, umframt kaka og smákøkur.

Okkara topp-10 máltíðir hava verið: Grind og spik, crispy chicken burgarar, kulottusteik, tortilla, turrur fiskur, karrybollar og rís, indiskur matur, fisk og chips, pulled pork og chips. Last but not least... an all time favorite: TOAST <3



# APPRECIATION

## ACTIV

Skrivað hevur: Beinta Joensen




Mynd: Beinta

Activ er altíð har fyri okkum, tá klokkan er 23:45. Altíð eru har góð starvsfólk til arbeiðis.
Tey vaksnu fólkini eru altíð so prátingarsom.

## DIANA

Skrivað hevur: Beinta Joensen




Mynd: Erla Ziskasen

Takk Diana, fyri at tú hjálpir okkum, so vit ikki eru livandi pinnar, tá vit fara til tíma. Og so vit ikki ljóða sum ein posi av kips, sum onkur hevur sett seg á, tá vit flyta okkum.

# MANGA

## á Bókasavninum

Skrivað hevur Karin Simonsen Myndir: Næmingar og Bárður

Vit blivu spurd, um vit kunda mála Manga-deildina á Býarbókasavninum. Manga eru japanskar teknirøðir. Vit hava sjálvi funnið upp á tilfarið til veggirnir, vit hava málað. Anna Solbjerg og Haakon Joensen eru tey, sum gjørdu endaligu skitsurnar at koyra á veggin. Hetta hevur eisini verið eitt skúlaprojekt, og í hesum tímunum hava vit havt Bárð D.C. at føra og læra okkum, og sjálvandi fáa vit øll eitt sindur av peningi afturfyri frá bókasavninum. Tað er eitt stuttligt upplivilsi at síggja okkurt, vit hava gjørt, verða víst fram og beundrað av øðrum.

Her vísa vit eitt "before and after" :












# Photodump












# Takk fyri okkum!



Her eru nakrir ormar, sum vit funnu her á skúlanum og kallaðu Annika, Jenis av Rana og Bárður

11_LISTA_RAVNAR